Listarliga tilfeingi› eisini vert pengar

Føroyingar hava í langa tí› dúva upp á fiskin. Fiskivinnan er okkara høvu›svinna, og hon er í stóran mun vi› til at tryggja okkum inntøkur. Alivinnan, sum nú knappliga fekk eitt óvænta› bakkast, hevur eisini sera stóra t‡dning fyri land og fólk. Ta› er spurningur um útflutning og milliardir av krónum.

Føroyingar eiga eisini eitt listarligt tilfeingi, sum ta› kann fáast meira burtur úr. Bæ›i ung og tilkomin hava gávur, sum einki standa aftanfyri tær hjá teimum, sum gera vart vi› seg úti í heiminum. Fólk, sum mála, yrkja og skriva, hava longu gjørt vart vi› seg, og ta› hev›i einki gali› veri› í, at tónleikarar í enn størri mun fóru at gera vart vi› seg.

Vit hava longu fingi› smakkin altjó›a gjøgnumbroti, tá vit hugsa um fólk sum Óla Poulsen, Kára Jacobsen og a›rar, men ta› eru framvegis tónleikarar her á landi, sum kundu fingi› altjó›a gjøgnumbrot.

Í dag hava vit samrø›u vi› eina unga evnaríka songkvinnu, Arnfrí› Lützen, og hon hevur dreymin um at náa út um landoddarnar vi› síni rødd. Sama er vi› eini a›rari fram úr songkvinnu, Eivør Pálsdóttir. Hesar bá›ar, sum eru ávikavist 16 og 18 ára gamlar hava serstøk evni sum sangarar, og tær eru umbo›andi eitt n‡tt ættarli› av tónleikarum, sum er vi› at vinna fram.

Helst er ta› onkur av hesum ungum fólkunum, sum skulu fáa kjansin í útlandinum, og ta› man neyvan nakar ivast í møguleikunum, sum til dømis Eivør Pálsdóttir og Arnfrí› Lützen hava.

Ta› hevur ofta veri› talan um, at ta› almenna eigur at vera vi› til at skunda undir eitt føroyskt gjøgnumbrot í altjó›a tónleiki, men enn er eingin verulig roynd gjørd. Ta› kostar pengar at føra seg fram uttanfyri Føroyar, men vi› tí tilfeingi vit hava, átti onkur – vinnan ella ta› almenna – trú› upp á, at vit kunnu fáa ein n‡ggjan vinnuveg vi› at útflyta tónleik.

Ta› eru tey, sum ikki ivast í, at vit fara at fáa eitt altjó›a navn – øll hini hava ta› jú – og at ta› bara er ein spurningur um tí›, a›renn onkur slær ígjøgnum. Men ta› skal eisini ein ø›iligur hugur og vilja til, á›renn ta› kann lata seg gera at koma fram. Ta› hava nakrir av teimum ungu tónleikarunum víst, og tí er grundarlagi› undir einum gjøgnumbroti› í lagi.

Send inn og vinn

3arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.



Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag

-Eg havi havt tvær læruríkar vikur

17 ára gamla sandoyargentan Sólrun H. Olsen hevur hesar seinastu tvær vikurnar veri› í starvsvenjing á Sosialinum. Og samstundis sum hon fylti 17 ár tann 30. mars, (sí mynd) fingu vit okkum eitt prát vi› hana.

HEINI Í SKORINI

Ja, Sólrun, nú hevur tú veri› her í tvær vikur. Hvussu hevur ta› veri›?
Eg haldi at ta› hevur veri› áhugavert, og ta› hevur eisini veri› sera lærurík at síggja hvussu ta› ver›ur arbeitt vi› at gera eitt bla›, og ta› at síggja hvussu bla›fólki› arbei›ir saman vi› myndamonnunum.

Kanst tú siga eitt sindur um arbei›splássi›?
Ja, her arbei›a uml. 25 fólk á Sosialinum, og øll eru sera hjálpsom. Huglagi› er eisini sera gott her úti, og er ta› sera hugnaligt at vera her. Fólki› á bla›num møtir kl. 8, og vanliga fáa tey frí kl. 16. Kortini havi eg hesar bá›ar vikurnar møtt kl. 9. Men hóast hetta eru tí›irnar hjá nógvum av arbei›sfólkinum sera óregluligar. Ein persónur sum arbei›ir á einum bla›i, skal altí› vera til rei›ar at fanga eina søgu, so um ein serlig hending ella eitt tiltak stingur seg upp, so má hann vera klárur at fara til arbei›is, líkamiki› tí› og sta›.

Hvat hevur gjørt teg mest bilsnan ta› tí›ina tú hevur veri› her?
Ta› er heilt víst hvussu nógv arbei›i ver›ur lagt í hvørt eintak av bla›num.

Er hetta eitt starv sum tú kundi hugsa› tær í framtí›ini?
Ja, ta› at koma runt og hitta fólk, hava samrø›ur og ikki minst at skriva søgur, hev›i eg væl kunna› hugsa› mær at arbeitt vi› í framtí›ini.

Tú hevur so ætlanir um at læra til bla›fólk?
Ja, ta› er mín ætlan eftir tr‡ ár í Høydølum. Um møguleikin er til sta›ar, so ætli eg mær at læra í Onglandi.

Hví júst í Onglandi?
Gó›ur spurningur. Hjá einum bla›fólki› er enskt nokk mest n‡tta máli› sum heild. Tí er gott at venja seg vi› ta› beinanvegin me›an man lærir. Og annars haldi eg bara at ta› er eitt spennandi land.

Hví valdi tú Sosialin?
Sum á›ur sagt ætli eg mær at læra til bla›fólk, og hetta er ta› sum eg havi hug til.

Hvat heldur tú annars um møguleikan at sleppa í starvsvenjing?
Ta› haldi eg er ein fínur møguleiki hjá ungum, ta› at sleppa at royna seg á einum arbei›splássi›, so ver›ur ta› møguliga lættari at vita hvat man skal seinni í lívinum.

Tvær vikur, er ta› eitt hóskandi tí›arskei›?
Bæ›i ja og nei. Aftaná tvær vikur hevur man nokk fingi› innlit í hvat arbei›i vi›víkur. Eg haldi kortini at man kundi væl veri› eina viku afturat. Tú ert júst komin inn í “rytmuna” eftir tvær vikur, og so skal man aftur á skúlabonk.

Hvørjar eginleikar skal eitt bla›fólk hava?
Tú skalt vera framligur, kreativur og duga at síggja hvat fólk tímir at lesa. Og sjálvandi skalt tú eisini duga at skriva. Ta› sum nokk fangar flestu lesarar eru gó›ar yvirskriftir og gó› bíløt, so ta› er t‡dningarmiki› at hava eyga fyri tí.

Vil tú mæla ø›rum til at fara í starvsvenjing sum bla›fólk?
ja, um tú hevur áhugan fyri at skriva, so vil eg avgjørt mæla tær til at fara. Tú skalt tó vera fyrireika›ur uppá at tú kanst koma at sita fyri teg sjálvan, tí at arbei›sfólki hevur úr at gera vi› bla›num. Tá er at n‡ta møguleikan at skriva so nógv sum gjørligt.

Takk fyri práti›, og gó›a eydnu í framtí›ini.
Takk fyri. Og vónandi fært tú eina gó›a viku afturat her, *ha-ha.*